# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



12. august fekk Napoleon henda fitta lítla beiggjan. Hann vigaði 4550 gr. og var 55 cm. langur. Foreldrini eru Rigmor í Lon, Miðvágur og Hans Petur Tjørnudal, Signabøur



15 august varð Johannes av Rana føddur á sjúkrahúsinum í Levanger í Noregi. Hann vigaði 3990 gram og var 52 cm langur. Foreldur hansara eru Synnøve og Danjal av Rana



10. august fingu Fríðunn og Kári Jacobsen, Streymnes, eina dóttur. hon var 52 cm. long og vigaði 3140 gr.

7. august fingu Ena Samuelsen og Magni Blástein, Vestmanna, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4200 gr.

10. august fingu Súsanna við Streym og Jesper Thomsen Horsens ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3790 gr.

10. august fingu Marueen Andreasen og Mortan Vang, Froðba, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3990 gr.

10. august fingu Sonja Gleðisheygg og Andre Magnussen, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4200 gr.

10. august fingu Elsa Gaardbo Lützen og Mogens Lützen, Argir, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3920 gr.

11. august fingu Linda Guttesen og Øssur Hentze, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4200 gr.

11. august fingu Kristina og Páll á Reynatúgvu, Sandur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3750 gr.

11. august fingu Arnleyð og Bergleif Sólsker, Sandur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

11. august fingu Maibritt og Hans Anfinnson Norðfoss, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3200 gr.

13. august fingu Anne Mette Greve Klemensen og Leif Hansen, Keypmannahavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3900 gr.

14. august fingu Marit H. Jensen og Fríðfinn Nicolajsen, Skopun, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3750 gr.

14. august fingu Katrin og Bergur Hansen, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3450 gr.

14. august fingu Lydia og Jan P. Jacobsen, Søldarfjørður, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4100 gr.

15. august fingu Sonja og Dánjal Davidsen, Kvívík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

15. august fingu Rutt Højgaard, Leirvík og Terji Petersen, Gøta, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3050 gr.

16. august fingu Sólvá og Sam Vang, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3500 gr.

**Brúdleyp**

Leygardagin 5. august giftust Maria og Marni Nattestad í Finnlandi og nú leygardagin 19. august kl. 11.00 verður opið hús í Oasuni í Hoyvík. Tað hevði glett okkum at sæð familju, vinir og kenningar.

Leygardagin 19. august giftast í Vester Hassing kirkju í Ålborg, Anita Hoydal úr Hoyvík og Jacob Snedker Jensen úr Ålborg.

Leygardagin 19. august kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni, Bjørt Splidt, Tórshavn og Hilbert K. Joensen, Nes. Veitslan verður fyri innbodnum kl. 19.30 í Róðrarneystinum á Argjum.

19. august giftast í ráðhúsinum í Århus, Petur Andersen, sonur Theu og Erik Andersen, Tórshavn og Malene Simonsen, dóttir Rie og Fin Simonsen, Ørnhøj, DK. Adr.: Bærmosevej 7, 8380 Trige.

Leygardagin 19. august kl. 10.00 giftast í prestagarðinum við Landavegin Ulla Gunvør Clementsen og Olaf Frits Joensen, Tórshavn. Opið hús verður í Skemmingsgøtu 21, Tórshavn, millum kl. 11.00 og 15.00.

Leygardagin 19. august giftast í Ishøj Landsbykirkju, Mirian Henningsdóttir, dóttir Lydiu og Henning Pedersen, Ishøj og Kim Brandstrup Olsen, Ishøj. Veitslan verður hildin fyri innbodnum á Greve Strandkro. Heimaadr.: Vibeholm Vænge 74, Ishøj.

**90 ára føðingardagur**

Í dag, verður Gunhild Rasmussen, fødd Egholm, Keypmannahavn, 90 ár. Dagurin verður hildin hjá soni hennara Peter B. Rasmussen, Elmehusene 8, 2600 Glostrup, tlf. 0045 43452089, leygardagin 19. august frá kl. 14.00. Øll eru vælkomin.



Leygardagin 19. august kl. 16.00 giftast í Ishøj Kirke Ann Hansen, Tórshavn og Frank Andersen, Hvidovre. Brúdleypasadr.: Baldersbækvej 2, 2635 Ishøj.

**Dagurin**

**19. august. Sebaldus**. Sigst at hava verið guðrøkin danskur kongssonur, sum var trúlovaður franskari prinsessu. Men hann fór frá henni og gav seg í kleystur í Nürnberg, har hann doyði í hvussu so er fyri ár 1070.

**20. august. Bernhard**, deyður í 1153. Abbati og kirkjulærari í Fraklandi. Kom upp í munka- og nunnuskipanina, ið róptu seg cisterciensaraskipanin. Har gjørdist hann skjótt oddamaður, og fekk stóran týdning í kirkjupolitikki og kirkjulæru í 12 øld. Bygdi í 1115 kleystrið Clairvaux og varð síðani róptur Bernhard úr Clairvaux. Hann var vanur at taka til: Ora et labora (bið og arbeið). Navnið er germanskt og merkir bjørn og harður.

**21. august. Sálomon**. Til minnis um hin vísa kongin Sálomon, sum sagt er frá í kapitlunum 1-11 í fyrru Kongabók í Gamla testamenti. Navnið merkir friður og vælferð.





## Farloyvisstarv

**Runavíkar kommuna søkir eftir starvsfólki til Heimið á Mýrunum í Runavík.**

Talan er um eitt farloyvisstarv í tíðarskeiðinum frá 15. september ella skjótast gjørligt til 30. juni 2007. Starvsbrøður 0,6125.
Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

**Krøv:**
- hevur viðkomandi útbúgving ella hjálparfólk við áhuga ella royndum fyri demensrøkt.
- hevur áhuga fyri røkt av minnisveikum fólkum
- hevur hug og hegni at vera um minnisveik fólk
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkunum
- er nýhugsandi og hevur hug og árræði at skipa fyri dagligum virksemi fyri tey minnisveiku

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt starvsumhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og verða við til at menna umsorgan og røkt
- góða innleiðslu
- góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evni
- eitt heimligt og hugnaligt umhvørvi, hvar ið hvør einstakur kann kenna seg væl

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála ímillum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Maibritt Jacobsen, leiðara á tlf. 477080 ella 448034.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

**Heimið á Mýrunum**
Mýravegur 26
620 Runavík

**Umsóknarfreist:** 2. september 2006